# Danmark vil ikki hava fangar



Tað hevur ljóðað, at Danmark kanska skuldi taka ímóti nøkrum av fangunum í Guantanamo-leguni, men danski verjumálaráðharrin, Søren Gade, sló fast í gjárkvøldið, at so verður ikki. Hann segði, at Danmark ásannar trupulleikan, men heldur tó ikki, at talan er um ein trupulleika, sum danir eiga at loysa. Amerikanski varaforsetin, Joe Biden, bað leygardagin onnur lond taka ímóti fangum, sum nú eru í Guantanamo-leguni. Ætlandi skal legan niðurleggjast um eitt ár.

# 131 deyð í skógareldum

Avstralsku myndugleikarnir kunngjørdu í morgun, at tá høvdu skógareldarnir har suðuri í landinum kravt 131 mannalív. Myndugleikarnir siga, at 31 skógareldar herja framvegis statin Victoria, og at fleiri bygdir eru kolaðar upp. Tíðindastovurnar skriva, at minst 750 hús eru farin upp í royk. Avstralska løgreglan hevur illgruna um, at fleiri av eldunum eru ásettir, og Kevin Rudd, forsætisráðharri, brúkti í gjár orðið "hópdráp", tá hann tosaði um tað, sum er hent í Victoria.

# Fuglafjørður styrkir tilbúgving

**Í vikuskiftinum royndu fuglfirðingar saman við veitarum eina nýggja oljusperru, sum er long og løtt at handfara, um olja skuldi farið á sjógv**

TILBÚGVING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*- Tveir mans kunnu einsamallir leggja sperruna út, um olja fer á sjógv. Annar passar trumluna á bryggjuni, og hin er í báti og sleipar sperruna út á vánna, sigur havnastjórin, Rólant Højsted*

Mynd: Vilmund Jacobsen

Fuglafjarðar kommuna hevur tikið stig til at bøta um tilbúgvingina. Kommunan hevur keypt eina nýggja oljusperru, sum er 350 metrar long. Tað eru feløgini Norlense í Noregi og Lamor í Finlandi, sum eru saman um at levera ein samlaðan pakka, ið eisini fevnir um frálæru. Pakkin er sjálv oljusperran, sum er á stórari trumlu, og síðan er ein skiljari og kompressari, sum skilir oljuna úr sjónum.

Í vikuskiftinum varð nýggja sperran roynd á Fuglafirði, tá ein norðmaður og ein finlendingur vóru her heima og løgdu lag á.

Umframt fólk úr Fuglafirði, vóru eisini onnur til steðar, eitt nú sløkkiliðið av Skálafjørðinum, Klaksvík og Tórshavn, umboð fyri Vaktar-og Bjargingartænastuna og umboð fyri oljufeløg.

## Størri tryggleiki

Havnastjórin við Fuglafjarðar havn, Rólant Højsted, sigur, at teoretiska frálæran fór fram á Muntra, og praktiska frálæran fór fram niðri á bryggjuni, har nýggja oljusperran eisini varð roynd.

- Nýggja oljusperran er øll uppi á eini stórari trumlu, sum tilsamans vigar eini 5-6 tons.

Rólant sigur, at sperran er sera løtt at handfara.

- Tveir mans kunnu einsamallir seta hana út, um olja knappliga fer á sjógv. Annar passar trumluna á bryggjuni, og hin er í báti og sleipar sperruna út á vánna. Sperran er soleiðis løtt at arbeiða við. Hon er long, og tað tekur stutta tíð at leggja hana út.

Havnastjórin vísir á, at hetta er ein neyðugur og týðandi partur av tilbúgvingini á Fuglafirði, tí nógv skip koma og fara um havnina millum ár og dag.

– Aftrat hesum kemur, at vit hava fingið goymslu til tungolju, og henda dregur fleiri og fleiri stór skip higar til bunkringar, leggur hann aftrat.

Rólant Højsted sigur, at tað er ein størri tryggleiki hjá kommunu og havnaumsjón, tá tú hevur eina slíka oljusperru at taka til, sum kann leggjast út eftir lítlari løtu.

# Slakar 700 skipavitjanir í 2008



**- Vit hava nógvar skipavitjanir um árið, og tí er eisini neyðugt við góðari tilbúgving, sigur havnastjórin**

FUGLAFJØRÐUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

*Í januar í ár hevði Fuglafjarðar havn stívliga 70 vitjanir av skipum ímóti 57 í sama mánaði árið fyri*

Mynd: Vilmund Jacobsen

Rólant Højsted tók við starvinum sum havnastjóri í við Fuglafjarðar havn 1. januar í ár. Hann er ættaður úr Funningi, men býr á Eiði. Rólant er útbúgvin skipsførari.

Aftrat sær á havnaskrivstovuni hevur hann tveir havnaumsjónarmenn.

## Stór skip

Talið av skipum, sum koma og fara um Fuglafjarðar havn millum ár og dag, er ikki tað størsta í Føroyum, men nógv av hesum skipum eru stór.

Í fyrsta lagi er tað Havsbrún, sum dregur stóru pelagisku skipini til sín, og síðan er tað trolvirkið Vónin.

Í Fuglafirði er eisini goymsla bygd til tungolju, sum hin einasta í Føroyum, og hagar leita stór skip til bunkringar.

## 700 um árið

Rólant Højsted sigur, at í fjør komu og fóru sløk 700 skip um Fuglafjarðar havn.

Alt bendir á, at talið av skipum heldur er veksandi enn minkandi.

– Taka vit januar mánaða í ár, høvdu vit fleiri enn 70 vitjanir ímóti 57 í januar mánaði árið fyri. Nógvar skipavitjanir krevja góða tilbúgving, sigur nýggi havnastjórin við Fuglafjarðar havn, Rólant Højsted.